ARBEIÐSUMHVØRVI
*Marjun Dalsgaard*




*– Vit fara helst at síggja meira av heilsufremjandi tiltøkum fyri starvsfólk, heldur Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum*

# Rørsla minkar um sjúkrafráveru

Tað loysir seg at taka sær væl av starvsfólkunum, vísir ein nýggj kanning, sum er gjørd av donskum fyritøkum, sum geva starvsfólki sínum heilsufremjandi tilboð. Danir hava eisini funnið útav, at har er nógvur peningur at spara. 40 prosent av spurdu fyritøkum bjóða starvsfólki sínum sunnan mat ella møguleika fyri at íðka ítrótt ókeypis ella bíliga, antin á arbeiðsplássinum ella á annan hátt.

Kanningina, sum fatar um 822 donskar fyritøkur, hevur Ledernes Hovedorganisation gjørt, og hon vísir, at fyritøkur, sum bjóða starvsfólkunum heilsufremjandi tiltøk, sum til dømis sunnan mat og umstøður til at íðka ítrótt, hava ein sjúkradag færri fyri hvørt starvsfólk um árið, enn fyritøkur, sum einki gera á hesum økinum. Sostatt hava starvfólk á fyritøkum uttan heilsufremjandi tiltøk umleið sjey sjúkradagar um árið, móti seks døgum hjá teimum, sum hava heilsufremjandi tiltøk.

Tað er serliga rørsla, sunnur matur og heilsutryggingar, sum gera munin. Onnur tiltøk, sum eru roynd, eru stuðul til at leggja av at roykja og drekka.

### Rákið kemur til Føroya

Heilsufremjandi tiltøk eru tó ikki nakað, sum føroyskar fyritøkur gera nógv burtur úr, men tað er tann vegin rákið gongur, og vit fara helst at síggja meira av tí her heima, heldur Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum.

- Tað plagar at vera soleiðis, at tað ganga nøkur ár, áðrenn tílíkt slær ígjøgnum í Føroyum, men tað kemur uttan iva, og tað er eisini eitt gott hugskot, at fyritøkur gera nakað fyri, at starvsfólkið hevur tað gott. Umframt at tey verða sunnari, fremur tað eisini um áhugan hjá teimum at arbeiða og vera í fyritøkuni. Á tann hátt kann fyritøkan eisini fáa nakað burturúr tí, sigur hann. Tað er tó ikki nakað Arbeiðseftirlitið gevur ráð um.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum heldur eisini, at heilsufremjandi tiltøk eru góð leiðsluamboð, men tað er ymiskt, hvussu ein fyritøka best nýtir tað.

- Um tú hevur eina fyritøku, har fólk arbeiða sjálvstøðugt og sita framman fyri ein skíggja allan dagin, kann tað lata seg gera, at tey fara inn við síðuna av og mýkja vøddarnir av og á. Hinvegin, hevur tú eina fyritøku, har hvørt starvsfólk er ein liður í eini samanhangandi arbeiðsgongd, ber tað ikki til, sigur hann. Hann heldur, at tað er meiri vanligt í Føroyum, at fyritøkur leiga eina høll, har starvsfólkið kann spæla fótbólt eina ferð um vikuna, tað er eisini gott bæði fyri samanhaldið og likamið.

Tað er tó ikki møguligt at siga, um sjúkrafrávera er ein trupulleiki í Føroyum, tí eingi tøl finnast yvir samlaðu sjúkrafráveruna. Tí er tað ógjørligt at samanbera Føroyar við onnur lond.

Tað verður sagt, at tað er ikki so nógv sjúkrafrávera í Føroyum, men tað man verða ein ógvuliga leysur pástandur, um eingi tøl eru, sigur Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum.

# Kondirúm til starvsfólkið

ARBEIÐSUMHVØRVI
*Marjun Dalsgaard*

Føroya Tele er ein fyritøka, ið roynir at vera frammarlaga, tá tað kemur til leiðslu og starvsfólkapoltikk, og nýggju hølini í Klingruni í Hoyvík hava eisini rammurnar til hetta. Ætlanin er møguliga at innrætta eitt kondirúm til starvsfólkið, og tankin aftanfyri er at økja um arbeiðsgleðina hjá starvsfólkinium og fyribyrgja skaðar, sigur ein av deildarleiðarunum á Føroya Tele.

- Vit hava eitt høli, sum skal nýtast tilstarvsfólkið, men enn er ikki endaliga avgjørt, hvat tað skal nýtast til. Tað hevur verið upp á tal at gera eitt kondirúm, sigur Ása Andreasen, sum er ein av tveimum deildarleiðarunum á starvsfólkadeildini hjá Føroya Tele.

Á henda hátt ynskja tey at minka um sjúkrafráveruna og fyribyrgja til dømis høvuðpínu og músaskaðar.

- Hartil er tað sera motiverandi fyri starvsfólkið, at tey kenna seg væl á arbeiðsplássininum, og at vit gera nakað fyri tey. Fyritøkan skal tó eisini hava nakað burturúr, og tí verður tað neyvan eitt billiardborð, sum kemur at standa inni í starvsfólkahølinum. So verður tað heldur kondimaskinur, leggur hon aftrat.

Ætlanin er tó ikki, at starvsfólkið skal mýkja



*Í nýggju hølunum í Klingruni verður eisini rúm fyri heilsufremjandi tilboðum.*

vøddar í arbeiðstíðini, men eftir arbeiðstíð.

Tað er tó sera umráðandi, at tú ikki stjelur alla tíðina hjá starvsfólkunum, sigur Ása Andreasen.

- Um fólk hava lyndi til at arbeiða ov nógv, biðja vit tey ikki fara heim, men vit vilja fegin, at tey ikki eru her ov nógv – eisini fyri okkara egnu skyld, tí hava tey ikki eitt lív við síðuna av, brenna tey út. Tað skal vera eitt mark millum arbeiði og privatlív, sigur hon.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Konfirmantar frá 1953 hittust

12. apríl 1953 vóru 34 børn fermd í Havnar kirkju. Fimmti ár aftaná, 12 apríl 2003, hittust 13 av teimum til eina hugnaliga løtu í somu kirkju, har Sverri Steinhólm prestur helt guðstænastuna við altargongd fyri teimum. Aftaná fóru tey oman á Hotel Hafnia, har tey fingu ein góðan bita og hugnaðu sær við práti og sangi restina av kvøldinum. Konfirmantarnir takka Sverra Steinhólm fyri at hann hóast konfirmatión næsta dag, tók sær stundir til at koma í kirkjuna við teimum og á hendan hátt gjørdi dagin til nakað heilt serligt. Eisini skulu kirkjutænarararnir hava eina stóra tøkk og tað sama starvsfólkini á Hotel Hafnia fyri góða móttøku.



*Aftast f.v.: Norman Tom Egholm, Tórshavn, Hjørleiv Poulsen, Hestur, Andreas Ziska, Tórshavn, Albert Hansen, Tórshavn. Mittasta rað f.v.: Fanny Karbech Mouritsen, Tórshavn, Marjun Niclasen, Tórshavn, Tórbjørg Rubeksen, Tórshavn, Ragnheiður Petersen, Tórshavn, Dagny Nielsen, Nólsoy. Fremst f.v.: Andrea Nicolina Jakobsen, Tórshavn, Sunneva Lindenskov, Tórshavn, Oddvør Jovina Herdis Petersen, Argir, Hallgerð Dalsgarð, Argir.*

Tey, ið ikki kundu vera við, eru: Eina Dam, Tórshavn, Liss Sivertsen, Tórshavn, Riborg Simonsen, Tórshavn, Erla Kirsten Viberg Olsen, Tórshavn, Sanna Jacobsen, Tórshavn, Sigrid Elisabeth Dalsgaard, Tórshavn, Sonja Clementsen, Tórshavn, Gunnvør Hammersheimb Christiansen, Tórshavn, Marjun Vilhelmsen, Tórshavn, Amalia Malena Olsen, Nólsoy, Sigga Caroline Johansen, Tórshavn, Andreas Joensen, Tórshavn, Tórur Grønborg Holm, Tórshavn, Jørgen Frands Heinesen, Tórshavn.

Tey, ið ikki eru okkara millum meira, eru: Niclas Jacob Hansen, Tórshavn, Christian Sigmundur Djurhuus, Hvítanes, Arnold Karbech Mouritsen, Tórshavn, Eivind Vøgg Guttesen, Tórshavn, Egin Wenningsted Jacobsen, Tórshavn, Marita Holm, Argir, Olina Marie Niclasen, Tórshavn.

### Dagurin

**9. juli. Sostrata.**
Hetta grikska kvinnunavnið er einki halgimennisnavn. Dagurin hevur hevur borið ymisk onnur nøvn, men frá árinum 1726 kemur navnið Sostrata í álmanakkarnar.

# Finn Christiansen heiðraður við riddarakrossi

Týsdagin 8. juli var móttøka í Norðurlandahúsinum, í sambandi við at Finn Christiansen hevur lagt frá sær sum norskur aðalkonsul í Føroyum, og Petur Even Djurhuus advokatur hevur tikið við. Í hesum sambandi er norski sendiharrin í Danmark, Dagfinn Stenseth, komin á vitjan. Á móttøkuni í Norðurlandahúsinum handaði norski sendiharrin Finn Christiansen "Den Kongeliga Norske Fortjernstorden, Ridder af første klasse". Hetta heiðurstekin fær Finn fyri sítt arbeiði sum norskur aðalkonsul í Føroyum frá 1995 til 2003.

Finn Christensen er 57 ára gamal og ættaður av Skála. Eftir at hann varð liðugur við sína útbúgving



*Finn Christiansen við útnevningarbrævinum hann fekk, tá hann bleiv norskur aðalkonsul í 1995*

Mynd: Jens Kristian Vang

sum maskinverkfrøðingur í 1977, arbeiddi hann hjá Burmeister & Wain í Keypmannahavn til 1980. Meðan hann las, koyrdi hann eisini hýruvogn í Keypmannahavn. Hann hevur eisini arbeitt hjá SEV sum maskinverkfrøðingur. Frá 1985 til 2000 arbeiddi hann hjá Det Norske Veritas í Føroyum, fyrst sum sýnsmaður og frá 1991 sum stjóri. Síðan novenber 2000 hevur Finn rikið sítt egna ráðgevavirki, Sp/f Atlantic Marine Surveyors, á Argjum. Umframt sína útbúgving hevur Finn tikið nógv ymisk skeið innan sítt yrki. Hann er giftur við Margrethu, f, Næs, tey búgva á Argjum og eiga tveir vaksnar synir.

## Martin Næs 50

Í dag, 9. juli, fyllir landsbókavørðurin fimmti ár. Martin Næs er vágbingur, sonur Brynhild, f. Stenberg, úr Sumba og Johs. Andr. Næs úr Nesi í Hvalba.

Martin tók studentsprógv í Hoydølum í 1975, og trý ár seinni tók hann prógv sum bókavørður á Danmarks Biblioteksskole í Keypmannahavn.

Hann var síðani bókavørður á Landsbókasavninum í eitt ár, á Býarbókasavninum í tvey ár, 1. bókavørður á Landsbókasavninum 1981-83 og eftir tað bókavørður á Akuroyri í tvey ár.

Frá 1985-88 var Martin Næs settur landsbókavørður, og síðani 1989 hevur hann havt hetta starv.

Hann hevur eisini havt ymisk nevndarstørv: í Setursráðnum á Fróðskaparsetrinum, í Rithøvundafelagnum, stýrinum fyri Norðurlandahúsið og Orðabókagrunninum hjá Fróðskaparfelagnum.

Martin er eisini skald. Hann hevur givið trý yrkingasøvn út og fýra barnabøkur. Í 1990 gav hann út skaldsøguna Tvey, og í 1995 kom eitt savn av greinum, ummælum, røðum og samrøðum. Tað kallast Hvør eigur flaggknappin?



Eisini hevur hann týtt nógv, barnabøkur, yrkingar, og saman við konuni týddi hann kanska fremstu skaldsøgu Halldór Laxness: Garpatáttur.

Í 1975 giftist Martin við þóru þóroddsdóttir av Akuroyri, og tey eiga børnini Flóvin þór, Guðný, Brynhild og Jónas Tór.